# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jonu Henriksen til minnis

Niðanfyri prenta vit minningarorðini, sum Jákup Lindenskov, fyrrverandi løgtings-, og landsstýrismaður, hevði um Jonu Henriksen í útvarpinum í gjárkvøldið:

4. september andaðist Jona Henriksen á Ellisheiminum í Havn, 82 ára gomul. Hon var borin í heim 4. januar 1924. Foreldur hennara vóru Elisabeth og Palli Henriksen, bæði úr Havn.

Tá barnaskúlin var frá hondini, tók Jona preliminerprógv. Tað var um tað mundið heimsbardagin brestur á, og Jona fer at arbeiða í H. N. Jakobsen Bókahandli. Meginpartin av krígsárunum er hon á fotodeildini, hevði týdningarmiklu ábyrgdina av myndatilfari, at slíkt sum kundi haldast at veita týskinum, fíggindanum, innlit um viðurskifti í føroyska samfelagnum, ikki kom í ljósmála.




Studentsprógv fær hon í 1946, og eftir tað er hon skrivstovukvinna í Bókhandlinum. Í 1950 í Føroya Banka, er m. a. kassameistari. Í 1967 verður Jona KFUK-skrivari og virkar í starvinum í 30 ár, til hon leggur frá sær í 1997.

Men tað vóru eisini heilt onnur ting, sum myndaðu mentakvinnuna Jonu Henriksen. Var alla sína tíð virkin - og á so mongum økjum. Umframt ævigi KFUK-skótin, so var Jona kenda býarmyndin, og politiskt var honvirkin og vitandi - samfelagsmedvitað í odd og egg.

Frá ungum árum kom hon upp í felagsvirksemi í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, tað førdi við sær, at Jona ofta kom fram í ljósið, tað var longu í krígsárunum, og har hon var, var ongantíð tøgn. Hon var engasjeraða røddin, gjørdi seg til kennar, men altíð við tí góða boðskapi, sum peikaði framá, og vit kunnu siga uppeftir, hon fjaldi ongantíð kristna hugburð sín. Parturin hjá Jonu Henriksen lá ongantíð eftir. Skótaarbeiði og virksemi millum tey eldru lá henni næst á hjarta. Hon royndi seg eisini á palli í Sjónleikarhúsinum.

Jona var býráðslimur frá 1969-72, og hon var løgtingslimur 1975-80, var fyrsta kvinna, sum hevði fast sæti á tingi.

Jona hevði dygdir, sum hon ofta gav frá sær á sín serliga hátt. Meiningar sínar gav hon eisini til kennar, oftast við brosi á kinn. Vildi so fegin, at øll føldu seg væl, hóast áskoðanin kundi vera ymisk. Trúgv var hon - altíð til reiðar.

Frið lýsa vit yvir minnið um megnarkvinnuna, Jonu Henriksen.

**Jákup Lindenskov**



## Til ommu og abba mín á diamantbrúðardegnum 08 sept. 2006

*Nú summarið er fari framvið,*
*sita tit, omma og abbi við lið.*
*Diamantbrúðardagurin er í dag,*
*og tí eri eg í góðum lag.*

*Hjá tykkum er altíð gott at vera,*
*tit vita ikki hvussu gott, tit skulu gera.*
*Omma alt gott á borðið man seta,*
*nei, hjá tykkum sleppi eg ikki undan at eta.*

*Sparka bólt við abba stuttligt er,*
*serliga, tá omma kemur upp í við ferð.*
*Abbi og eg hoppa songini í,*
*nei, tá blandar omma seg ikki uppí.*

*Omma ruddar og vaskar hvønn ein dag,*
*abbi gongur túrar, keypur inn við góðum lag.*
*81 og 88 ár tit eru blivin nú,*
*hvør skuldi hesum trú.*

*Eg ynskji tykkum ein góðan dag,*
*nú vit øll við tykkum eru so glað.*
*Jesu pápi tykkum er hjá,*
*tillukku ynskjist her Aron frá.*

## Kafé-kvøld í Margarinfabrikkini

Hóskvøldið 7.september kl. 20 verður aftur skipað fyri kafékvøldi fyri tey ungu.

Dánial Guðjónsson fer saman við einum vinmanni at framføra við gittara og sangi.

Í hugnaliga umhvørvinum í kaféini, verður eisini møguleiki at fáa ókeypis heimabakaða køku og kaffi, te og saft.

Komandi mánaðirnar verður hetta eitt afturvendandi tiltak, har ung hava møguleika at fara á tónleikakafé í roykog rúsfríum umhvørvi.



**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 8. september 2006 hava Essemi og Petur Højgaard, Saltangará diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 5. juni.

Takk fyri gávur, telegramm og uppringingar, takk til øll úr bygd og bý, sum komu framvið.

Ein serlig tøkk til børn og svigarbørn og øllum tykkum, ið annars hjálptu til at gera dagin sera hugnaligan. Takk øll somul.

**Poul Johannus Zachariasen**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra kona, mamma vermamma og omma

**Estrid Nilssen**
Tvøroyri

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 5. september, 70 ára gomul.

Kistan fer frá kapellinum á Tvøroyrar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Brynjolf,**
**Arvid, Virgar, Sverri og Bergur**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Arne Jespersen, Tvøroyri**, andaðist týsdagin 5. september, 62 ára gamal.

**Estrid Nielsen, Tvøroyri**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 5. september, 70 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Tvøroyri kirkju. kunnu lata KFUK eina gávu. Konta í Føroya Sparikassa.

**Dagurin í morgin**
**8. september. Mariumessa** um heystið. Hildin sum føðingardagur Mariu. Dagurin er dilkadagur. Tríggir dagar um heystið verða nevndir dilkadagar. Teir eru mariumessa 8. september, mikkjalsmessa 29. september og alhalgunardagur 1. novenber. Tá var okkurt serstakt havt til matna, helst av seyði, og dilkur var tann matur róptur, sum etin varð.